Magne Arge, formaður í Oljuvinnufelagnum:

# Enn eingin oljubonansa – men leggja ikki árar inn

**– Vit mugu venja okkum við støðuna og brúka  ta tíð tað tekur at finna oljuna. Vit mugu fara í gongd við tað vit hava í hondini og sum ber til innan fyri rímuliga stutt tíðarskeið og annars halda grýtini í kók, tí tað fer at koma eitt leitiumfar aftrat. Tað verður eisini einaferð borað gjøgnum basaltið, og tað er at vóna, at vit einaferð koma í eina oljutilgongd**



*Nevndin í Oljuvinnufelagnum hevur avgjørt ikki mist trúnna uppá eina føroyska oljuvinnu. Vit mugu bara gera okkum greitt, at hetta tekur tíð*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

OLJAN

*Orð: Jan Müller*

Oljuvinnufelagið umrøddu støðuna í oljuvinnuni og oljuleitingini á fundi í vikuni. Magne Arge, formaður sigur, at tey enn ikki hava viðgjørt úrslitið av ENI-boringini, men at tey í næstu framtíð ætla sær at fáa fund bæði við ENI og við Oljumálaráðið at viðgera úrslitið av boringini og støðuna sum heild í oljuleitingini á landgrunninum.

– Vit kundu hugsað okkum at fingið eina støðumeting her og nú sigur Magne Arge, sum leggur aftrat, at hóast negativu úrslitini higartil, so ætlar felagið at halda fast um at skipa ein ráðstevnudag um oljuleiting og oljuvinnu seinast í november ella tíðliga í desember eins og felagið hevur gjørt tey seinastu árini. Evnið fer at vera ein støðumeting eins og seinast. Hvat metir man um støðuna út frá fýra brunnum og seismiskum kanningum annars. Eisini annað útbjóðingarumfar og hvussu vit koma víðari fer at verða partur av tí ráðstevnuni.

Hvat heldur so formaðurin í Oljuvinnufelagnum sjálvur um støðuna:

– Vit eru greið yvir, at tað gjørdist einki bonasa á hesum sinni við eini skjótari tilgongd, og vit mugu venja okkum til, at hetta er ein spakulig tilgongd vit eru í gongd við í oljuvinnuni. Tað er so heldur eingin orsøk til at leggjja árararnar inn av teirri orsøk heldur.

## Uppí oljuvinnu aðrastaðni

Magne Arge heldur, at vit kanska heldur skulu leggja okkum eftir at koma upp í arbeiðið uttan fyri Føroyar. Her hugsar hann um tær fyritøkur, sum veruliga hava áhuga í at koma sær uppí oljuvinnuna t.d. mekaniskir verkstaðir ol.

*– Hví hava vit tá ikki lagt størri dent á júst tann partin?*

– Kanska tí at vit hava verið nokk so nógv sentrerað uppá at taka lut í tí, sum hendir her hjá okkum. Menn og kvinnur hava gjørt seg tilreiðar at fara í gongd, um olja bleiv funnin. Beint nú er tað eitt sindur óvist at siga, hvussu stórt tað virksemi kann blíva, og tað virksemi kann eisini blíva torført at halda um, tá tíðin við virksemi er so stutt. So vit skulu nokk hyggja eftir øðrum økjum eisini.

Magne Arge heldur tað eisini vera sera umráðandi hjá okkum at vísa á, hvussu góð servicestøð, veitingarstøð Føroyar kunnu verða, ikki bara fyri oljuvinnuna men fyri alla maritima tænastu yvirhøvur. Tað er so kanska ikki júst ein uppgáva fyri Oljuvinnufelagið, men kortini er tað ein sannroynd, at teir flestu limirnir í Oljuvinnufelagnum eru veitarar av einum ella øðrum slagi eitt nú til virksemi á havinum. So tað er at fara í gongd við tað vit hava í hondini og sum ber til innan fyri rímuliga stutt tíðarskeið og annars at halda grýtini í kók, tí tað fer at koma eitt leitiumfar aftrat. Tað verður eisini einaferð borað gjøgnum basaltið, og tað er at vóna, at vit einaferð koma í eina oljutilgongd.

Magne Arge minnir okkum eisini á Marjunbrunnin. Vit vita jú ikki, hvat har verður at finna. Hann vísir eisini á, at tað er sera áhugavert, hvat hendir í bretskum og norskum øki. Her sipar hann til boringina norðaliga í bretskum øki eftir einum ristatórum gassfelti, Ben Nevis og so fundið, Ellida, sum júst er gjørt á djúpum vatni í norskum øki. Her er talan um jarðløg, sum helst eisini finnast um okkara leiðir, so vit eiga avgjørt ikki at missa vónina um at gerast framleiðandi oljutjóð fyri tað, at nakrir brunnar eru turrir.

Hvat viðvíkur seinasta brunninum tí hjá ENI, so er formaðurin í Oljuvinnufelagnum sjálvandi vónsvikin, at hann bleiv turrur, men leggur dent á, at hetta vistu vit kundi henda. – Sjálvandi hevði eg vónað, at teir vóru hepnir. Men tær øgiliga vónirnar, sum vit høvdu skrúvað upp undan fyrstu boringini hava vit fyri langari tíð síðani punkterað.

Magne Arge heldur, at vit mugu síggja realistiskt uppá tingini. Tað nyttar ikki at billa sær sjálvum inn, at tað stendur eitt oljuboom stutt fyri framman. Tað er alt, sum bendir á, at verður tað ein stór oljuvinna í Føroyum, so fer tað at ganga yvir eitt longri tíðarskeið.

Hann heldur tað annars verða rætt at fasthalda áhugan hjá oljufeløgunum. Tað er sera umráðandi og ein stór og týðandi uppgáva at halda oljufeløgini føst her.




*Tað er ikki bara sum at siga tað at finna olju. Tol og eisini hepni skal til*

## Treytirnar

*– Heldur tú at vit tá eiga at linka treytirnar fyri leita eftir olju?*

– Tað dugi eg ikki at síggja. Eg veit ikki, hvørjar treytir kunnu vera medvirkandi til, at oljufeløgini hava størri ellla minni áhuga. Men sjálvandi skal tað vera praktiskt at kunna arbeiða. Hvat tí vinnuligu síðuni viðvíkur, so haldi eg tað hevur virkað væl. Vit hava so heldur ikki fingið aðra afturmelding frá oljufeløgunum, og tí eri eg ikki tilreiðar av selja út av teimum áhugamálunum í løtuni.

Magne Arge viðurkennur tó, at tað mest umráðandi er at fáa leitingarnar gjørdar.

*– Men hevur tað ikki verið ein ávís misnøgd í vinnuni við, hvussu ávís oljufeløg hava fyrihildið seg fyri føroyskum veitarum?*

– Tað hava vit eisini tosa um í nevndini at taka upp í eini evaluering saman við oljufeløgunum og Oljumálaráðnum og so taka við læru av tí. Eg haldi, at allir partarnir  eiga at seta seg saman og tosa um støðuna, áðrenn man fer alment út við slíkum. Tað eru oftani frágreiðingar uppá, hví hesin og hasin hevur borið seg at uppá ein ávísan hátt. Vit mugu hava møguleika fyri at greiða frá, áðrenn man staðfestir nærsagt brot og annað.

Í nevndini í Oljuvinnufelagnum eru Magne Arge, Gunnbjørn Joensen, Árni Joensen, Gunnvør Balle og Jákup Mikkelsen.



# Vesturheimurin kann vænta eina stórari yvirgangsatsókn

**Tað sigur avstralski forsætisráðharrin, John Howard. Upplýsingarnar hevur hann frá landsins fregnartænastu**

YVIRGANGUR

*Árni Joensen*

Ovastin í avstralsku fregnartænastuni, Dennis Richardson, heldur stóran vanda vera fyri, at Vesturheimurin skjótt fer at uppliva eina yvirgangsatsókn, sum kanska verður líka ógvuslig sum tann at Worl Trade Center í New York fyri skjótt trimum árum síðani.

– Vit eru rættiliga vís á, at atsóknin kemur. Tað er bara ein spurningur um tíð, segði Dennis Richardson fyri nøkrum døgum síðani.

John Howard, forsætisráðharri, er samdur við sínum fregnartænastuovasta.

– Eg skal viðganga, at ein ávaring sum hendan kann ljóða ógvuslig, men hetta er tann heimur, sum vit liva í í dag. Eingin eigur at undirmeta, hvussu nógv heimurin er broyttur síðani tann 11. september í 2001, segði Howard við Sky News í gjár.

Avstralska uttanríkisráðið hevur mælt sínum ríkisborgarum frá at fara til Indonesia, tí fregnartænastan hevur fingið ábendingar um, at yvirgangsmenn fyrireika fleiri atsóknir at vesturlendskum málum har. Tað sama hevur amerikanska uttanríkisráðið gjørt.

# Vandi fyri oljudálking í Pakistan




*Tangaskipið »Tasman Spirit« hevur staðið á einari grynnu sunnan fyri pakistonsku strondina síðani ólavsøkuaftan. Nú er vandi fyri, at øll oljan í tangunum fer at renna út í havið*

**Ólavsøkuaftan fór tangaskipið »Tasman Spirit« á land sunnan fyri pakistonsku strondina. Nú er vandi fyri, at 47.000 tons av olju fara í havið**

OLJUDÁLKING

*Árni Joensen*

»Tasman Spirit« hevur 67.000 tons av olju í tangunum. Áðrenn manningin fór av skipinum, eydnaðist tað henni at tryggja nakrar av tangunum, men nú bera pakistonsku myndugleikarnir ótta fyri, at 47.000 av teimum 67.000 tonsunum fara at renna út í havið.

Skipið stendur á einari grynnu nakað sunnan fyri størsta havnarbýin í Pakistan, Karachi, og havnarmeistarin har, Ahmad Hayat, segði við BBC í gjár, at stórur vandi er fyri, at skipið ferst, og at øll oljan rennur út í havið. Havnarmeistarin segði, at fleiri rivur eru komnar í tann 24 ára gamla skrokkin, og at rivurnar gerast bæði breiðari og fleiri, tí skipið livir rættiliga nógv.

Pakistanskir havfrøðingar siga, at tað verður ein sonn vanlukka fyri umhvørvið har á leiðini, endar øll oljan í havinum. Á hesum leiðunum er nógvur fiskur og nógv skeljadýr, og nógvar skjaldbøkur eru longu funnar deyðar fram við strondini, sigur BBC.

Eitt reiðarí í Pakistan eigur »Tasman Spirit«, sum siglir undir grikskum flaggi.

## Vænta mafiakríggj

Løgreglan á italsku oynni Sisilia ber ótta fyri, at eitt veruligt mafiakríggj fer at taka seg upp á oynni, eftir at ein handilsmaður varð skotin, meðan hann var og klipti sær hjá einum hárskera í býnum Favara.

Italsk bløð skrivaðu í gjár, at ein ella tveir menn komu inn til hárskeran og skutu tann 51 ára gamla Carmelo Milloti. Hárskerin segði seg ikki vita nakað at siga løgregluni, men tað er eisini tað vanliga svarið, sum løgreglan á Sisilia fær í slíkum viðurskiftum.

Almenni ákærin í Palermo, Piero Grasso, sigur, at morðið er helst eitt tekin um, at tann friður, sum hevur valdað millum flestu mafiabólkarnar á Sisilia í seinastuni, hevur fingið ein enda. Hann sigur seg seg vera sannførdan um, at tað, at morðið hendi á alljósum degi, er eitt tekin um, at tað var ætlað sum ein boðskapur til ein ella annan. Tann myrdi Carmelo Milloti varð tikin í 1997 og dømdur sjey ára fongsul fyri ymisk brotsverk, men hann varð latin leysur eftir bert at hava sitið stutta tíð í fongslinum.

## Hevði 1,5 tons av vápnum við hús

Løgreglumenninir í Kvinnherad í Hordalandi í Noregi gjørdust ikki sørt skakkir, tá teir  funnu hálvt annað tons av vápnum og lóðuri í íbúðini hjá einum manni.

Hertta var stutt fyri jól í fjør, men almenningurin hevur einki hoyrt um ta stóru vápnagoymsluna fyrr enn nú, tí nú er maðurin dømdur eitt árs fongsul. Helmingurin av tíðini er kortini treytað. Revsingin umfatar kortini ikki bara vápnagoymsluna, tí maðurin er eisini dømdur fyri at hava víst seg naknan fyri nøkrum smágentum og einum kvinnuligum hýruvognsførara.

Løgreglan í Hordalandi sigur, at maðurin, sum er í fimtiárunum, hevur havt stóran áhuga fyri vápnum í mong ár. Í íbúð hansara funnu løgreglumenninir maskinbyrsur, hondgranatir og eina rúgvu av lóðuri, men hildið verður, at maðurin eisini kann hava  fjalt vápn og lóður onkra aðrastaðni.

## Øltrot í Bretlandi

Tann nógvi hitin í Bretlandi í seinastuni hevur gjørt, at bretar hava drukkið so nógv meiri øl enn vanligt, at eftirspurningurin er vaksin heili 40 prosent samanborið við eitt vanligt summar.

Bryggjarífyritøkan Carlsberg-Tetley í Northampton sigur bart út, at har megna tey ikki at fylgja eftirspurninginum, og tí hevur fyritøkan gjørt av at innflyta øl úr Danmark. Talskvinnan hjá fyritøkuni, Donna Croswell, sigur, at tað hava ongantíð upplivað slíkan eftirspurning, og at tey hava ongan møguleika at bryggja nóg mikið, sjálvt um tey hava arbeitt nógv meiri enn vanligt.

Hitin í Bretlandi hevur sett fleiri met í seinastuni, og fyri fyrstu ferð, síðani mátingarnar byrjaðu, fóru hitamátararnir upp um 38 stig nú ein dagin. Tað gamla metið var 37,1 stig og stavaði frá 1990.

## Vann 500 milll. í lotto

Seinastu seks mánaðarnar hevur eingin havt seks røtt í italska lottospælinum, og tað hevði við sær, at vinningurin var komin upp um á 66 milliónir evrur ella umleið eina hálva milliard krónur mikukvøldið.

Hetta hevði við sær, at fólk úr grannalondunum Slovenia, Eysturríki, Fraklandi og Sveits fóru til Italia at royna at fáa aftur á tí stóra vinninginum, og nógv útlendsk ferðafólk, sum eru í Italia, lógu eisini framvið. Italskir fjølmiðlar skriva, at pensjonistar, lesandi og fólk, sum annars ikki plaga at spæla í lottospælinum, royndu seg hesaferð.

Mikukvøldið eydnaðist tað so loksins at finna ein vinnara. Hvør hann er, varð ikki almannakunngjørt, men tíðindastovan Ansa visti at siga, at tann hepni vinnarin býr einastaðni í útjaðaranum í stórbýnum Milano.